

# Vilt tú tryggja okkara samskifti?

***Tryggingarfelagið Føroyar stevnir við fullari ferð móti settum málum og avbjóðingum í altjóða høpi.***

Kundavinarligt og greitt samskifti, umframt ein framsøkin og nýhugsandi marknaðardeild, eru týðandi liðir í at røkka málum okkara.

Fyri at styrkja og menna hesi leita vit nú eftir rætta samskiftisfólkinum, ið m.a. skal taka sær av samskiftismálum hjá felagnum. Kanska hetta er júst tú?

## Vit kundu hugsað okkum, at tú ...

- hevur viðkomandi útbúgving og/ella royndir og hug at arbeiða innan samskifti og marknaðarføring
- ert tænastusinnað/-ur, fyrikomandi og hevur góð evni og vilja til at samstarva
- dugir væl at raðfesta, at halda ásettar freistir og ert framsøkin
- dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- hevur lætt lyndi og sært tað skilagóða í broytingum
- dugir væl at samskifta bæði munnliga og skrivliga

## Vit kunnu bjóða tær

Nýtt, fjølbroytt og avbjóðandi starv í eini spennandi fyritøku, sum er í stórari menning.
Eitt starv, ið tú í stóran mun hevur møguleika fyri at verða við til at skapa, í eini fyritøku við greiðum málum, virkisfúsum starvsfólkum og góðum arbeiðsumstøðum.

## Arbeiðsøki

Samskiftisfólkið kemur at starvast á deildini fyri Menning & Marknaðarføring.
Deildin fyri Menning & Marknaðarføring er deild hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, men veitir eisini ráðgeving til onnur feløg í samtakinum, herundir TF Holding og Betri pensjón.

Deildin er býtt í trý øki. Hesi eru Menning, Marknaðarføring og KT.
Samskiftisfólkið kemur at starvast í økinum fyri Marknaðarføring, ið hevur ábyrgdina av øllum samskiftis- og marknaðarføringsmálum hjá felagnum.

## Lønar- og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum og lønt í mun til útbúgving og royndir.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Kristinu Háfoss, deildarstjóra, á tlf. 21 00 36 ella við at senda teldupost til kh@trygging.fo.

Starvið skal setast skjótast til ber.
Umsóknarfreistin er 20. november 2008 kl. 12.00.

*Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:*

Tryggingarfelagið Føroyar
Marknaðardeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn
ella umvegis www.trygging.fo

sansir.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR P/F
Kongabrúgvin . Postsmoga 329 . FO-110 Tórshavn . tel. +298 345600 . Faks 345601 . tf@trygging.fo . www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*






Ring
44 33 66
og bílegg
borð

# Nýggj matstova er latin upp í Bovling í Leirvík



**Mánadag til fríggjadag er buffet kl. 11.30-14.00**
**Køkurin er opin til kl. 22.00**

Bovling í Leirvík · tel: 44 33 66 · bovling@bovling.fo · www.bovling.fo